# Landa toskin í Føroyum, hýsuna í Skotlandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

At kapping er um fiskin, sæst á øllum uttanlandssølunum seinastu tíðina. Skip sigla á útlendska marknaðin, og fiskur verður landaður í Føroyum og sendur av landinum. Summi skip leggja ein part av veiðini upp í Føroyum og fara at landinum við tí partinum, tey vænta loysir seg best.

Línuskipið, Jógvan Norði, landaði fríggjadagin eini 50.000 pund av eitt nú toski og brosmu í Saltangará, men fór niður til Skotlands við umleið somu nøgd av hýsu.

Fiskavirking í Saltangará landaði skipið. Saltfiskavirkið á Toftum keypti toskin til saltingar.

### Kúrberg og Vesturtúgvan

Snelluskipið, Kúrberg, landaði í Saltangará fríggjadagin. Teir høvdu eini 400 kassar av stórum og góðum toski, sum teir fingu á Føroya Banka. Eisini tann fiskin keypti Fiskavirking á Toftum.

Vesturtúgvan, sum partrolar saman við Grønanesi, landaði eisini í Saltangará fríggjadagin, meðan Grønanes landaði í Vestmanna. Bæði skipini vóru full; tey høvdu eini 180.000 pund av upsa í part.

- Fyrrapartin av túrinum royndu skipini vestanfyri, seinni á Føroya Banka. Upsin, teir fingu vestanfyri, var rættiliga smáur, meðan upsin, teir fingu á Føroya Banka, var væl betur, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari.

Mánamorgunin hevði virkið í Saltangará eini 180.000-200.000 pund av upsa inni á gólvinum.

Ætlandi landa fyrrverandi Topas og Sardis í Saltangará í dag. Teir eru nú heimahoyrandi í Vágunum.



*Jógvan Norði landaði til Fiskavirking í Saltangará*

# Eingin landing á Sandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin, tá ið vit frættu, var eingin landing á Sandi, og óvist var, nær skipini koma innaftur at landa.

- Vit hava tó nóg mikið av fiski inni á báðum virkjunum til dagin í dag og meginpartin av degnum í morgin, sigur Jóan Petur Vest.



*Nógvir avbygdabátar hava róð út av Sandi fyrr í vár, men nú eru allir farnir heimaftur*

Sandoy Seafood keypir fisk bæði beinleiðis frá skipum og bátum og á uppboðssølu. Nógvur fiskur hevur verið á marknaðinum í longri tíð, so væntandi er ikki, at virkini í Sandoynni liggja leingi uttan fisk.

### Útróður

Nógvur útróður var úr Sandoynni fyrr í vár. Umframt bátarnar í oynni, vóru bæði suðuroyingar, havnarmenn og hestmenn á Sandi og róðu út. Nú er so nógv útliðið, útróðurin er minkaður, og bátarnir eru farnir heimaftur.

Jóan Petur Vest sigur, at bátarnir, sum eru heimahoyrandi á Sandi, hava seinastu tíðina ligið millum 500 og 600 pund um dagin, tá ið roynandi hevur verið.

# Venus á Miðvági við 90.000 pundum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Línuskipið, Venus, var á Miðvági mánadagin við umleið 90.000 pundum av toski og hýsu. Fiskavirking í Miðvági keypti hýsuna, sum verður skorin til flak og partvís fer til portiónir. Onnur virkir keyptu toskin.

Albert Ellefsen, virkisleiðari, sigur, at hýsan yvirhøvur er smá.

Sagt hevur verið, at hýsan, sum trolararnir fáa, er væl betri enn hýsan hjá línubátunum, men Albert heldur, at tað veldst um, hvar skipini fiska.

- Hýsan hjá trolarunum er eisini misjøvn, sigur hann.

Spurdur, hvussu hann væntar, at næstu dagarnir verða á virkinum, sigur Albert, at tað er ilt at meta um so tíðliga í vikuni, men hann væntar, at nóg mikið verður at gera alla vikuna.

- Veðrið er hampiliga gott, og streymurin er góður, so línuskipini kunnu fáa ein túr aftrat. Tey flestu eru komin innaftur, og nøkur eru farin útaftur, sigur virkisleiðarin.



# Klaksvíkingur flotaður

**Seinnapartin sunnudagin klokkan fimm bleiv nýggja tíggjumannafarið hjá Klaksvíkar Róðrarfelag flotað fyri fyrstu ferð**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Her nemur nýggi Klaksvíkingur fyri fyrstu ferð við sjógv*

**Klaksvík:** Hóast tað ikki varð lýst, so vóru heilt nógv fólk savnað niðri við kappróðrarneystið sunnudagin, tá nýggja flaggskipið hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, Klaksvíkingur, bleiv flotaður ella signaður, sum tað eisini verður tikið til.

Fyrst bjóðaði Kristian Eli Zachariassen, formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag, øllum vælkomnum og segði nøkur orð, har hann millum annað takkaði stuðlunum. Klaksvíkingur er stuðlaður av p/f Christian í Grótinum og JFK Trol. Og so varð tíggjumannafarið sett á sjógv. Mannagongdin er hon, at tað verður róð tríggjar ferðir runt við sólini, tá báturin fyri fyrstu ferð verður flotaður. Klaksvíkingur er mannaður við næstan øllum teimum, sum róðu við Nevinum Reyða í fjør. Tríggir nýggir mans eru eisini við.

### Umfatandi íløgur

Klaksvíkar Róðrarfelag hevur í dag fimm nýggjar kappróðrarbátar standandi inni í neystinum. Tríggir eru frá 2001 og tveir frá 2002.

– Vit høvdu ikki kunnað gjørt nakað av hesum uttan stuðulin, sum vit hava fingið frá fyritøkum, sigur Kristian Eli Zachariassen, formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag.

– Lions Club lat Fípuna Føgru í fjør.

Hann sigur eisini, at í fjør gjørdu limir felagsins eitt stórt arbeiði við at skipa fyri tiltøkum, so at peningur kundi savnast inn.

– Umframt at vit settu hol á arvagullið hjá okkum, tað vil siga, at uppsparingin hjá felagnum eisini varð nýtt.

Í ár er tað so sum sagt p/f Christian í Grótinum og JFK Trol, sum hava latið Klaksvíking og fyrr í ár lat Norðoya Sparikassi tað nýggja fimm mannafarið, sum enn ikki er heilt klárt at flota.

Aðrar íløgur hjá Klaksvíkar Róðrarfelag eru átta rógvimaskinur av slagnum Concept 2 og eitt klima anlegg, sum skal verða ein avfuktari til bátarnar. Anleggið ger at fuktigheitin inni í bátaneystinum verður meiri jøvn.

– Vónin er, at við klimaanlegginum sleppur ongin væta inn í bátarnar, meðan teir standa inni í neystinum, sigur Kristian Eli.

Hann sigur, at tað er kostnaðarmikið at reka eitt róðrarfelag, og eitt tiltak, sum Róðrarfelagið fer at gera aftur í ár er stuðulsrógvingin. Men enn er ikki avgjørt, nær tað skal verða.

- Vit hava gjørt av at hava stuðulsrógvingina aftur í ár, tí hon eydnaðist so væl í fjør, sigur formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag.

### Torført at endurvinna FM heitini

Spurdur um, hvussu tað man fara at gangast Klaksvíkar Róðrarfelag í ár, svarar Kristian Eli:

– Tað verður torført at liva upp til úrslitini í fjør, men eg vænti, at okkurt gott úrslit verður.

– Felagið hevur í dag fimti aktivar limir, so eg ivist ikki í, at onkur manning fer at klára seg væl, sigur Kristian Eli Zachariassen.

Torleif Sigurðsson, varaborgarstjóri í Klaksvík:

# Norðoyatunnilin setur krøv

**– Undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð er eitt stórt framstig, men tað er ongin ivi um, at tað fer at seta munandi hægri krøv til Norðoya økið, sigur Torleif Sigurðsson, varaborgarstjóri**

NORÐOYA TUNNILIN
*Solby A. Eliasen*



*Torleif Sigurðsson, varaborgastjóri í Klaksvík, spyr hvussu verður við vegakervinum, tá Norðoya tunnilin er komin*

**Klaksvík:** – Tað er eitt stórt framstig, at tað er samtykt at fara í gongd við Norðoya tunnilin, heldur Torleif, men hann spyr hvat hendir, tá tunnilin er komin ígjøgnum.

– Tað er onki at ivast í, at ferðslan í Klaksvík kemur at verða økt munandi, og so er spurningurin, um vegakervið hjá okkum heldur til tað, sigur Torleif, sum eisini vísir á, at tað búgva umleið 6.000 fólk í Norðoyggjum. Har av búgva 1.200 uttan fyri Klaksvík.

### Vegakervið ikki nøktandi

Torleif sigur, at vegakervið við tunlarnar norðyvir á Borðoynni er ikki nøktandi, sum er, tað megnar ikki ta tungu ferðsluna og so kann ein bert spyrja hvussu verður, tá undirsjóvartunnilin við allari sínari øktari ferðslu er komin.

– Man kann ímynda sær, at rættiligt ferðslu kaos verður í tunlunum norðanfyri.

Hann sigur, at spurningin, um verandi tunlar skulu umvælast ella nýggir skulu gerast, má sakkunnleikin viðgera.

### Havnin undir Grótrætt

Torleif vísir á, at fyrireikingar til komandi undirsjóvartunnilin eru í gongd.

Norðuri á Grótrætt er ein ídnaðar- góðs og fríhavn, sum hevur ein keikant, ið er sera djúpur, í gerð.

Torleif sigur, at summi vænta, tá tunnilin er komin, at tað fer at verða einvegis ferðsla út úr Klaksvík, men tað væntar hann ikki.

– Ætlanin við havnini á Grótrætt er, at fáa virksemið á meginøkinum norður henda vegin til okkum í Norðoya økinum.

– Havnin norðuri á Grótrætt verður væntandi liðug á heysti 2004, sigur Torleif Sigurðsson.

### Tunga ferðslan

Torleif sigur, at landsverkfrøðingurin hevur teknað ein veg, sum skal verða oman fyri Geilina í Klaksvík og norður í frákoyringina til Ánavegin.

– Hesin vegur hevði verið avbera góður til ta nógvu, tungu ferðsluna, sum arbeiðið í Grótrætt førir við sær. Og alt annað norðanfyri eisini.

– Tað er umráðandi at royna at leiða ta tungu ferðsluna út um tað bygda økið, sigur Torleif Sigurðsson, sum heldur at, tann ætlaði Ringvegurin oman fyri býin er ein landsuppgáva.

At enda sigur Torleif, at man kann tosa um kommunusamanlegging ella ei, men ikki kemst rundan um, at norðoyingar, tað vil siga, fólk í Klaksvík og norðanfyri, arbeiða hvør hjá øðrum, og tí er tað sera umráðandi, Norðoya økið er væl skipað.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1997, 151.000 km.
**94.000**

**Nissan Primera 1,6 LX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
**69.000**

**Nissan Primera 2,0**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
**47.000**

Sosialurin

**Nissan King Cab 4x4 Diesel**
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
**78.000**

**Peugeot 206 XR 1,9 D**
bronze, 5 hurðar,
árg. 1999, 88.000 km.
**110.000**

**Peugeot 306 XS 2,0 St. Car**
Ljósa bláur, 5 hurðar,
árg. 1999.
**130.000**

**Peugeot 306 Diesel Aircon**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 47.000 km.
**125.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,6 Club Wagon**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 110.000 km.
**55.000**

**Opel Astra 1,7Dtl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**99.000**

**Opel Astra 1,8 Club Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 104.000 km.
**70.000**

**Opel Astra 1,6**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1999, 52.000 km.
**119.000**

**Opel Astra 1,7d Wagon**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 142.000 km.
**55.000**

**Opel Astra 1,7d Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 99.000 km.
**65.000**

**Opel Astra 1,6 Club Wagon**
brúnur, 5 hurðar,
árg. 1997, 40.000 km.
**85.000**

**Saab 900 S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 119.000 km.
**98.000**

**Ford Fiesta**
bláur, 5 hurðar,
130.000 km.
**22.000**

**Mazda 323 1,5**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1998, 66.000 km.
**95.000**

**Mazda 323 F 1,6i GLX**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 116.000 km.
**77.000**

**Seat Cordoba Vario 1,4**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1999, 25.000 km.
**89.000**

Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61